DAGSINS MEINING

Kostiligt - annar tekur og annar gevur

Ta› skal ásannast, at landsst‡risma›urin í mentamálum er snarur í vendingini. Hann var ikki meiri enn komin í sessin, so flutti hann ein skúla úr Havn su›ur á Tvøroyri. Hetta hendi so knappliga - vist í eini rø›u á tingi - at øll gjørdust púra paff. Bæ›i samgongufelagar og andsstø›ulimir. Ja, andstø›an visti ikki, um hon skuldi mótmæla, sum andstø›ur eru vanar, ella koma vi› einum her›aklappi.

Solei›is hevur hann tiki› okkum á bóli einafer› afturat. Nú ger hann knappliga altjó›a arbei›aradagin - 1. mai - til frídag í skúlum okkara, samstundis sum hann tekur av frídagin sjálvan grundlógardag! Púra beint hin gamli, mundu óiva› mong á vinstraveingi, fakfelagsfólk, og onnur hugsa, tá tí›indini komu úr hátalarunum á middegi mánadagin - dagin fyri kommunuvali›. Endiliga aftur ein at finna í Tjó›veldisflokkinum, sum hugsar sum teir gomlu - sló›ararnir - í hesum flokki.

Men stokkut var gle›in. Sama kvøld letur løgma›ur frætta - gjøgnum somu hátalarar - at hetta ber slettis ikki til. So væl spælir klaveri› heldur ikki. Landsst‡risma›urin hevur hvørki spurt løgmann ella restina av landsst‡rinum eftir, tá hann strika›i grundlógardagin og setti 1. mai sum frídag ísta›in. Løgma›ur vil slettis ikki hava hetta sitandi á sær. Hann átalar framfer›ina, og slær fast í tí›indaskrivi, at hann tekur ikki undir vi› broytingini.

Sjálvandi tekur løgma›ur - sum borgarligur politikkari - ikki undir vi›, at 1. mai ver›ur frídagur. Harnæst sigur ta› seg sjálvt, at løgma›ur kann ikki gó›taka, at ein landsst‡risma›ur bara fremur slíkar avger›ir uttan at bo›a løgmanni frá fyrst. Hetta er sjálvandi eitt mál, sum landsst‡ri› má taka stø›u til. Uttan at vita, hvat standur um mannagongdir í samband vi› politiskar landsst‡risfundir, so sigur ta› seg sjálvt, at landsst‡rismenn kunnu ikki bara handla og virka, sum teimum lystir.

Annars var hetta ikki sørt kostiligt - og gevur okkum eina gó›a mynd av einum løgi› samansettum Tjó›veldisflokki. Ta› eru bara nakrir fáir dagar sí›ani, at landsst‡risma›urin í fíggjarmálum seg›i kortanei til, at dagrøktararnir fingu frí 1. mai eins og øll onnur tímalønt. Hesi bo›ini hava ikki meiri enn komin, so bo›ar ein annar landsst‡risma›ur fyri sama flokk frá, at 1. mai skal ver›a frídagurin hjá skúlunum. Hetta er líti› anna› enn lagnunar speisemi: Sonur gamla fiskimannafelagsmannin úr Søldarfir›i noktar fólki frí 1. mai, samstundis sum rei›arasonurin á Glyvrum gevur næmingum og lærarum frí arbei›aradagin. Mangt broytist á mansins ævi!

Hóast vit enn eru undir danskari grundlóg, so sigur grundlógardagurin okkum neyvan ta› stóra. Hví hann skal vera hálvur ella heilur frídagur, munnu eisini mong seta spurnartekin vi›. Á›ur plagdur fólk at skera torv grundlógardag, men ta› ver›ur ikki gjørt meiri. - Munnu ikki tey, sum annars hella til arbei›ararørsluna - fakliga og politiskt - óiva› halda, at skilabetri er halda frí 1. mai, sum jú er altjó›a arbei›ara- og solidaritetsdagurin? So, í so máta er landsst‡risma›urin ikki langt av lei›. Men máti skal vera vi›. Ella var henda frábo›anin bara seinasti leikur í kommunuvalinum?

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Til Ebbu

Haldi ikki eg taki munnin ov fullan, tá eg vegna meg sjálvan og teir mongu av mínum vinmonnum, sum "vuksu" upp heiminum hjá Ebbu og Niels í Sverrigøtu 13, sigi, at vit fara at minnast Ebbu sum naka› serligt - sum eitt menniskja, sum var› gó› vi› okkum, og sum altí› lat dyrnar standa opnar fyri okkum.

Ta› kann tykjast eitt sindur løgi›, at ta› júst skuldi vera hjarta›, sum sveik nú á 80. ári, tí ta› var nettupp títt stóra og annars sterka hjarta›, sum vit hava noti› so nógv gott av og sum eg og onnur vi› mær fara at minnast teg fyri. Títt gó›a og stóra hjarta› h‡sti eini eldsál, sum gav okkum vinmonnum hjá Birgir, so nógv gott í beini› og naka›, sum - uttan at vit kanska hava givi› okkum so nógv far um - eisini er vor›i› partur av okkum gjøgnum lívi›.

Hví - spyr kanska onnur, sum lesur hesi or› - hevur júst henda havnarkonan havt so nógv at siga fyri meg og a›rar javnaldrar, nú meira enn 30 ár vóru millum okkum!

Longu sum dreingir og unglingar mi›skei›is í 60-árunum sluppu vit inn í hugnaliga og vakra heimi› hjá Ebbu og Niels í Sverrisgøtu 13, í Fransabrekkuni, og ta› lærdu vit skjótt at kenna sum okkara anna› heim. Hóast man kanska gjørdist eitt sindur kløkkur fyrstu fer› tú møtti Ebbu, so bestemt og kontant kona hon var, so komst tú tó skjótt á bylgjulongd vi› hana. Tær løturnar eru mangar, tá vit sótu væl í heiminum hjá Ebbu og Niels. Altí› væl móttikin og oftani var› bor›reitt vi› onkrum gó›um á tí so ey›kenda langa bor›inum úti í køkinum. Og vit kammiratarnir sótu sum a›rir riddarnar á bonkinum rundan um bor›i› hjá Ebbu. Har var altí› so hugnaligt og rudduligt, og tú lærdi eisini skjótt at seta stóran prís uppá hetta einastandandi heimi› í Sverrisgøtu.

Eftir eina stutta "moralprædiku" um, hvussu vit ikki áttu at tíggja okkum, var› alt sum á jólum. Einki var óført, har var heimabaka› køka, piparnøtur, ja enntá døgur›i á bor›inum, tá høvi bey›st. Í køkinum hjá Ebbu var ikki bert ovnahiti, her var virkuligur hjartavarmi. Her kendi tú teg sum heima.

Vitja›i Ebbu naka› á›renn hon fór. Ta› kendist sum at standa aftur í køkinum í Sverrisgøtu. Hóast um 80 ára aldur, so var Ebba tann sama sum eg mintist hana frá barna- og ungdómsárunum. Bestemt og vi› sínum markantu meiningum um nærum alt í lívinum. Ta›, sum annars hev›i ey›kent hesa dámligu konu, var, at hon altí› stríddist og streva›ist fyri onnur ta› veri› seg fyri síni familju, sínum næstrinum ella fyri okkum dreingjum, sum á sinni høvdu funni› sær ein "bústa›" í sjálvum hjartanum í mi›b‡num. Hóast høgan aldur var hon kortini framvegis virkin. Nú sat hon og fylgdi gongdini úti í heimi og hev›i sínar meiningar um ta› eisini. BBC var henni sera hent øll tey seinastu árini. Hon bant, las fjøll av bókum og hon fór gjøgnum hvørja grein í føroysku blø›unum. Hon var virkin í bindiklubba og var at síggja í SMS til ta› seinasta. Ein ótrúlig kona, kvinna. Sum alt sítt lív stríddist og hev›i sum lívsstevnu at kunna forsyrgja sær og sínum. Eitt menniskja› vi› æru og vir›ing fyri sær og sínum og ø›rum.

Ebba lærdi meg nógv, ta tí› eg slapp at kenna meg sum part av heimi hennara í Sverrisgøtu 13. Hon lærdi meg at kenna ábyrgd, hon lærdi meg lívsvilja og strí›svilja og ikki minst lærdi hon meg toleransu. Man kundi gott vera ósamd, men harfyri tolerera›i og virdi man hvønn annan. Nettupp naka›, sum vit kundu lært naka› av í hesum politiskt turbulentu tí›um.

Eg haldi, at ta› kann sigast so stutt og greitt: Ebba var ein mó›ur fyri so mong, tí hon hev›i eitt so gott hjarta›. Aftan fyri hennara heldur bestemtu og avgjørdu meiningar og útsagnir lá eitt so tolerant og sosialt menniskja›, og ta› er hetta eg og onnur vi› mær fara at minnast Ebbu Mortensen fyri. Ebba var ein ótrúliga stolt kvinna og húsmó›ur. Hon var ikki tann, sum lat onnur gera arbei›i› fyri seg. Hon var altí› har mest leika›i á. Hon leg›i naka› stórt og náturligt í at arbei›a. Og man hennara arbei›ssemi ver›a komi› mongum til gó›ar.

Vit, sum í dag hava børn í tí aldri, vit vóru í, tá vit kendu okkum so væl heima í Sverrisgøtu, hava fingi› naka› gott í beini› frá Ebbu og hennara formaningum og rá›um um m.a. at lata persónligt frælsi og fríheit og ábyrgd fylgjast at í øllum lívsins vi›urskiftum. Og ikki minst frá hennara sosiala hugbur›i og medfer›. At vilja øllum væl og altí› ofra seg fyri hini. Eisini er ta› ein lívsvísdómur vit hava fingi› frá Sverrisgøtutí›ini og Ebbu: fyri ta› um tú ikki var samdur í øllum, bar kortini til at liva saman í sátt og semju.

Ein orsøkin til at eg loyvi mær at skriva nøkur fátæklig or› um hesa kvinnu er fyrst og fremst tann, at hon var so gó› vi› okkum dreingir í nettupp tí so avgerandi aldrinum, tá man byrja›i at ganga í b‡in. Har ta› skal vera pláss fyri bæ›i gó›um rá›um og forstáilsi. Og ikki minst fyri innivist. Fyri okkum, sum bú›u eitt sindur í útkantinum av b‡num var ta› sum at hava fingi› eina oasu mitt í b‡num, har vit kundu koma og fara sum okkum lysti, antin undan ella eftir dansin.

Og Ebba var tann lívgevandi pálmin í hesi oasu.

Men eg skrivi hetta eisini - ikki fyri at hava peikifingurin á lofti - men fyri at minna onnur á, hvussu nógv vit skylda teimum, sum í dag eru vor›in gomul, at vit vir›a tey fyri ta› tey vóru fyri okkum, tá vit vóru yngri. Lívi› er alt ov stutt og ríkt til bara at gloyma tey, sum eldast.

Nú Ebba er farin kenst ta›, sum um naka› er mist, i› eg var gó›ur vi› og setti prís uppá. Tøkk gó›a Ebba fyri, at tú altí› var so ærlig, rei›ilig, bestemt og fitt vi› okkum, sum fóru úr barnaheiminum og inn í vaksnamannaheimin. Tøkk fyri títt tol vi› okkum.

Jan

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Økt kapping um ráværuna

Alaska pollock fiska›ur í russiskum sjógvi í fjareystri, flakaskorin í Kina, ví›ari virka›ur til fiskafingrar í Bremerhaven og seldur í Keypssamtøkuni í Havn

FISKIVINNA
Ólavur í Beiti

Vinnuhúsi› skrivar, at búskaparligu broytingarnar í Ruslandi hava hvat vi› sær, at fiskivinnan har í sta›in fyri at fokusera uppá heimamarkna›in nú fokuserar uppá útflutningsmarkna›ir fyri at fáa fatur á valuta frá vestligu markna›unum. Ta› hevur m.a. ført til at russiskir trolarar hava landa› stórar nøgdir av ráfiski til m.a. norsk fiskavirkir.

Russar hava eisini sí›an fyrst í 90-unum útflutt stórar nøgdir av Alaska polock, sum er fiska›ur í russiskum øki í fjareystri til virkingar í Kina, sum sí›ani útflytir vøruna til USA og ES markna›in. Útflutningurin av Alaska pollock frá Ruslandi og Kina til Evropa økti frá 90.000 tons í 1993 til 180.000 tons í 1998.

Prísgongdin

Ein kanning, sum er gjørt av prísgongdini á ymiskum fiskasløgum vísir, at prísurin á toski ikki ávirkast stórvegis av prísgongdini á ø›rum fiski, me›an prísurin á ø›rum bíligari fiskasløgum skiftir alt eftir broytingunum í tilgongdini á ø›rum fiskasløgum sum t.d. Alaska pollock, Hake og Hoki.

Manglandi útbo› av toski hevur ført til økta kapping um ráværuna. Toskastovnurin í Canada er illa fyri og hevur veri› ta› eina tí umframt, at ES seinnu árini hevur minka› toskakvoturnar. Gongdin í Barentshavinum seinnu árini hevur eisini veri› tann, at kvoturnar eru minka›ar ár fyri ár. Manglandi tilgongd av ráværu til virkingar á evropeiska ráværumarkna›inum hevur tr‡st prísirnar uppeftir.

Hetta hevur gjørt ta› gjørligt hjá norskum og russiskum veitarum at selja frysta ráværu til t.d. kinesiskar framlei›arar og í 1999 sæst ein økjandi útflutningur av frystum toski m.a. til Kina. Hetta er eitt úrslit av, at nøgdirnar av Alaska polloch á markna›inum eru minkandi og at kinesiskir framlei›arar tí leita um alla ver›ina eftir alternativari ráværu.

Avbjó›ingin størri

Fiskiskapurin í Barentshavinum seinastu árini hevur í ávísan mun veri› mynda›ur av smáfiski, sum er d‡rur at framlei›a hjá norskum fiskavirkjum og er tí vor›in grundarlagi› fyri søluni av smátoski til kinesiskar framlei›arar. Sjálvt um nøgdirnar úr Noregi eru smáar er orsøk til at fylga hesi gongd. Lønarkostna›irnar í m.a. Kina og Su›ur-Korea eru sera lágir og kunnu ver›a vi›virkandi til, at avbjó›ingin hjá evropeiskum framlei›arum í framtí›ini gerst stór.

Umframt at kappingin um ráværum er vor›in meira global merkja framlei›arar eisini kappingina á li›ugvøru- markna›unum. USA hevur seinnu árini innflutt toskaflak frá Kina í somiki› stórum nøgdum, at ta› hevur ávirka markna›arvi›urskiftini á hvítum fiski á amerkanska markna›inum. Dømi eru um tosk, fiska›ur í Barentshavinum, virka›ur í Kina og seldur til brúkarin í Amerika.

Ein kann av sonnum ey›merkja markna›in fyri fisk - bæ›i ráværu og li›ugtvøru sum globalan eisini fyri føroyskar fiskivinnu, sum má royna at fylgja vi› gongdini globalt og gera ætlanir og handla út frá tí, skrivar Vinnuhúsi›.

Tí›indaskriv frá Bókadeild Føroya Lærarafelags

Tvær n‡ggjar bøkur

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givi› út bøkurnar »Drekaskipi›« og »Shakespeare tjóvurin«

Barnabókina »Drekaskipi›«, i› Maj Bylock hevur skriva›. Ásvør Djurhuus t‡ddi úr svenskum og Jan-Åke Winqvist myndpr‡ddi bókina.

Ungdómsbóina »Shakespeare tjóvurin«, i› Gary Blackwood hevur skriva›. Marianna Debes Dahl t‡ddi úr enskum.

»Drekaskipi›« fer fram í víkingatí›ini, og bókin sn‡r seg um 10 ára gomlu Petite, dóttir ein riddara í stóra Frankaríki. Hon hevur hoyrt søgur um, hvussu víkingar úr Nor›urlondum seta eld á b‡ir og ræna langt inni í landinum. At ver›a tikin fangi og gjørd trælur í teirra kalda landi er verri enn dey›in! Og nú hendir ta› henni, Petite! Hon ver›ur tikin og førd sum trælur til køldu Nor›urlond.

Ein dagin eydnast henni at r‡ma. Ein ma›ur, i› dugir at rista rúnir, og kona hansara, Bóal, finna Petite í skóginum, bangna og illa fyri. Tey taka hana til sín og kalla hana Ásu, men hini í bygdini halda, at hon líkist einum trøllabarni...

»Drekaskipi›« er spennandi, løtt lisin søga úr víkingatí›ini. Bókin er einar 114 bls., heft, og kostar kr. 125. Repro-Z hevur sta›i› fyri umbróting og prenttilger›. Bókin er prenta› á Einars Offsett, og Helga Justinussen hevur heft.

»Shakespeara tjóvurin« er spennandi, hendingarík krimisøga, tú sleppur henni ikki, fyrr enn sí›sta sí›a er lisin:

– Tú skalt stjala sjón leikin hjá Shakespeare, Hamlet, ella...

Hesi vóru bo›ini frá harra hansara. Og Skarvur, ein ney›ars fa›ir- og mó›urloysingur, i› dugir ta› sjáldsama kynstri› at skriftrita: at skriva stutt, kvikliga og loyniliga ta› tala›a or›i› eins skjótt, i› ta› ver›ur tala›, hann noy›ist at gera eftir bo›unum. Harri hansara eigur hann og kann gera vi› hann, sum honum lystir. Skarvur kemur sær tí fram at í Globe sjónleikarhúsinum, har sjónleikarbólkurin hjá Shakespeare venur og leikar sjónleik – og nú broytist lív hansara av álvara.

Fyri alt í ver›ini má hann dylja veruligu orsøkina, hví hann er har, fyri Shakespeare og leikarum hansara, sum taka væl ímóti honum og fara vi› honum, sum var hann ein av teirra egnu. Skarvur kemur í svára tvístø›u: skal hann svíkja áliti› hjá n‡ggju vinunum, teir fyrstu, hann nakrantí› hevur átt? Onga a›rasta›ni hevur hann kent seg heima...

»Shakespeare tjóvurin« er einar 236 sí›ur, heft vi› klaffum, og kostar kr. 130. Repro-Z hevur sta›i› fyri umbróting og prenttilger›. Bókin er prenta› á Einars Offsett og Helge Justinussen hevur heft.

B36 bjóðar øllum dreingjum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti í høllini á Hálsi í døgunum 1.-2. des. 2000. Aldursbólkarnir eru hesir:

		Føðiár
1	Gentur 10-12	1989-1990
2	Smágentur 12-14	1987-1988
3	Gentur 14-17	1984-1986
4	Pinkulingar	1993-1994
5	Smápiltar	1991-1992
6	Piltar	1989-1990
7	Smádreingir	1987-1988
8	Dreingir	1985-1986
9	Unglingar	1982-1984

Spælt verður við stórum málum og málmanni. Á hvørjum liði eru 5 leikarar (málmaður íroknaður). Loyvt er at hava ein skiftisleikara.
Liðini skulu hava fótbóltsnøvn.
Luttøkugjaldið er kr. 200 fyri hvørt lið.
Føroya banki, ið stuðlar kappingini, letur heiðursmerki til trý tey fremstu liðini í hvørjum aldursbólki.
Seinasta freist at boða frá luttøku er **týsdagin 28. november 2000.**
Tilmeldingin fer fram hjá umboðsmonnunum við hesar skúlar, ella við at ringja:

Tórshavnar Kommunuskúli	Jacob Thomsen, 31 62 29
Venjingarskúlin	Poul Rói Mohr, 31 68 95
Eysturskúlin	Ingi Højsted, 31 75 83
Hoyvíkar skúli	Gunnar Bláberg, 31 77 34
Santa Frans Skúli	Kenneth Djurhuus, 31 10 49
Argja skúli	Petur Mortensen, 31 04 10

Leygardagin verður kapping millum vaksnar leikarar úr B36, HB og landsliðnum. Eftir hesa kappingina verða leikbúnarnir tveittir út til áskoðararnar.
Í sambandi við kappingina verður diskotek í B36-húsinum Leygarkvøldið 2. des. kl. 21.

www • team 85 • fo